# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúlan í Tórshavn:

## Húsasmiðir fingið prógv



*Fríggjadagin 17. februar var prógvhandan hjá húsasmiðum á timburdeildini á Tekniska Skúlanum í Smiðjugerði í Havn.*
*Teir sum fingu prógv vóru, f.v.: Benjamin Lydersen, Skálavík, Elibert Kirke, Saltnes, Gunnar Hansen, Hósvík, Jón Sólsker, Eiði, Karl Robert Vang, Tórshavn, Kjartan Magnussen, Argir, Mads Emil Johansen, Leynar, Óli Olsen, Skáli, Páll Sjúrður Jacobsen, Saltangará, Símun Pauli Hansen, Tórshavn, og Sune Strøm, Tórshavn*

## Gentukórið »Kassia« til Damarkar



*Frá 23. til 27. februar verður gentukórið Kassia á sangferð í Danmark*

**Hósdagin 23. februar fer gentukórið »Kassia« í Ebenezer í Havn til Danmarkar**

Talan er um gentur í aldrinum 10-13 ár, sum vanliga venja hvønn mikudag. Tó hava tær vant meira nú í sambandi við túrin. Navnið Kassia verður umtalað nakrar ferðir í Bibliuni og merkir "Angandi børkur". Kassia verður nýtt til salvu og smyrsl.

Kassia skal syngja í Kristnastovu í Keypmannahavn fríggjakvøldið 24. februar kl. 20.00. Leygarkvøldið 25. februar kl. 20.00 syngja tær á eini musikkcafé í Glostrup Frikirke. Sunnumorgunin 26. februar kl. 10.30 verður sungið í Kristent Fællesskab í Rødovre, har tær eisini búgva, og sunnukvøldið 26. februar kl. 20.00 syngja tær á Hotel Tórshavn.

22 gentur eru við í ferðalagnum. Kórleiðarar eru: Charlotta á Váli Olsen, Brita á Váli Smith, Poula Sørensen, og Anna Maria E. Anthoniussen. Kári við Rættará er klaverspælari hjá kórinum, Ólavur á Váli Olsen spælir bassgittar og Anna á Váli Smith spælir cello. Sungið verður á føroyskum, donskum og enskum.

Saman við kórleiðarum og hjálparfólki verða tey umleið 30 í tali.

Kórið verður aftur í Føroyum mánadagin 27. februar.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Petra Næs Joensen**, Tórshavn, andaðist í heiminum leygardagin, 18. februar, 97 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin, 22. februar, kl. 13.

**Jona Lenvig**, ættað úr Skúvoy, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 17. februar, 87 ára gomul. Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin 21. februar kl. 13.

**Boe Hansen**, ættaður av Amager, búðsitandi í Sørvági, andaðist sunnudagin 19. februar, 78 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin kl. 14. Sálmabókin verður nýtt. Tey, ið vilja minnast Boe, kunnu lata eina peningagávu til Sørvágs Kirkju; konta í Føroya Sparikassa. Kistan við Sannu Herdalur, Hov, fer úr Kirkjugarðskapellinum í Havn mánadagin 20. februar kl 13. Tey, ið vilja minnast Sannu, kunnu lata eina peningagávu til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim; konta í Føroya Sparikassa.

**Jakob Oluf Jakobsen**, Fuglafjørður, andaðist á Landssjúkrahúsinum 17. februar 88 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin 19. februar kl. 15. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju mánadagin 20. feb. kl. 14. Tey, ið vilja minnast Jakob Oluf kunnu lata eina peningagávu til Parkinsonsfelagið, konta í Føroya Banka.

**Olga Bærentsen**, Olga í Ruba, andaðist fríggjadagin 17. februar, 88 ára gomul. Jarðarferðin verður mánadagin 20. februar kl. 14. Tey, ið vilja minnast Olgu, kunnu lata eina peningagávu til: Porto til útbering av Sunnudagsblaðnum; konta í Føroya Sparikassa.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi og abbi okkara

**Ove Anstrup**

andaðist 17. februar, 64 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Brønshøj Kirke 24. februar kl. 12.00.

*Familjunnar vegna*

**Amalia**

†

Kunngjørt verður fyir ætt og vinum, at góði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Jacob (Jakku) Hansen**
vanliga nevndur skómakarin við Gøtugjógv

andaðist í heiminum sunnudagin 19. februar, 90 ára gamal.
Kistan fer úr heiminum, í Filadelfia í Gøtu, týsdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Filadelfia hósdagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Klara, Kári, Anna, Jóannes og Líggjas**

*Tey ið ynskja at lata blómur ella krans, kunnu lata Zarepta eina gávu.*